


# Kinesarar fáa oljuleitiloyvi í Íslandi

**Jan Müller**

23.01.2014 - 12:29

Oljan.fo

**Tað mundi koma óvart á mong, tá tað nakað herfyri frættist, at almenna Kina hevði áhuga fyri at leita eftir olju og gassi í Íslandi.**

**Nú hevur almenna oljufelagið CNOOC so fingið sítt fyrsta oljuleitiloyvi í hesum partinum av heiminum og skal kinesiski áhugin fyri íslendsku undirgrundini helst eisini síggjast sum partur av kinversku arktisku strategiini at vera við í einum møguligum framtíðar oljuævintýri í hesum partinum av heiminum.**

**Íslendski Orkustovnurin upplýsir nú, at almenna kinverska oljufelagið CNOOC hevur fingið tillutað leitiloyvi í íslendskum øki saman við íslendska felagnum Eykon Energy og norska almenna felagnum Petoro.**

Tey trý feløgini hava ávikavíst 60%, 15% og 25% part í loyvinum, har CNOOC er fyristøðufelag.

Hetta er triðja loyvið, sum verður latið á Drekaleiðini millum Ísland og Jan Mayen. Faroe Petroleum er eitt av feløgunum, sum hevur fingið leitiloyvi áður.

Tað er íslendski "Orkustovnurin", sum letur loyvini og er her talan um triðju útbjóðingina á íslendskum øki.

Kelda: offshore.com

Enn er óvist, nær feløgini fara undir veruligar kanningar og boring.